**Bárður á Steig Nielsen**
**Helgi Abrahamsen**
**Magnus Rasmussen**
**Erhard Joensen**
**Johan Dahl**
**Eyðdis Hartmann Niclasen**
**Jaspur Langgaard**
**vegna Sambandsflokkin**

Løgtingið

**Uppskot til**

# Løgtingslóg um stavrað

**§ 1.** Føroyska stavraðið er skipað í hesar bókstavir: A, Á, B, C, D, Ð, E, F, G, H, I, Í, J, K, L, M, N, O, Ó, P, Q, R, S, T, U, Ú, V, W, X, Y, Ý, Z, Æ, Ø.

**§ 2.** Føroyska stavraðið er bindandi fyri almennar myndugleikar, m.a. skúlar og stovnar, og er einasta galdandi stavrað.

**§ 3.** Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur fyri nýtslu av stavraðnum í skúlum og málsligari leiðbeining.

**§ 4.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Lógaruppskotið byggir á tilmælini frá Løgtingsins Mentanarnevnd í løgtingsmáli 16/2009. Ein samd nevnd legði fram álit, har heitt varð á landsstýrið um at fyrireika eitt málráð, sum skuldi avloysa Málnevndina. Nevndin legði dent á, at ráðið skuldi vera so breitt samansett, at fleiri fatanir komu til orðanna í ráðnum, umframt at spurningurin um stavraðið átti at verða viðgjørdur í hesum ráði. Nevndin vísti í tí sambandi á, at spurningurin um stavraðið ikki bara er málfrøðiligur, men eisini politiskur, og at Løgtingið bæði kann og eigur at geva sína hugsan til kennar um hetta mentanarpolitiska mál.

Niðurstøðan hjá Løgtingsins Mentanarnevnd viðvíkjandi spurninginum um stavraðið var:

1) at Føroyar bara eiga at hava eitt stavrað,
2) at hetta stavrað skal vera løggilt (autoriserað), og
3) at tað skal hýsa stavunum C, W, Q, Z og X, eins og stavrøðini í nærum øllum teimum málum, føroyskt er skylt við.

Hetta stavraðið, við 34 stavum (tað latínska stavraðið við 26 stavum umframt 8 serstavir), vanliga nevnt móðurmálsstavraðið, samsvarar við nútímans føroyska málbrúkið, eins og tað samsvarar við stavrøðini í nærum øllum teimum málum, føroyskt er skylt við, sum t.d. stavrøðini í tí enska, danska, norska, svenska, týska, franska og spanska málinum.

Føroyska málið verður í dag ikki bara myndað av arvorðum, men eisini tøkuorðum og fremmandaorðum. Stavirnir C, W, Q, Z og X eru partur av málsliga veruleikanum, bæði í heitum, náttúrufrøði, læknafrøði, tøkni, tølum, nøvnum o.ø. At hesir stavirnir formliga eru úti úr stavraðnum, hevur elvt til stórar praktiskar trupulleikar í skúlum og á málsøkinum yvirhøvur.

Ein kanning hjá Lóðri á vári 2014 vísir, at umleið 70% av Føroya fólki taka undir við móðurmálsstavraðnum, meðan bara umleið 30% stuðla tí skerda stavraðnum (kanningin endurgivin í greinini “Fólkið sigur ja til CQWX og Z” í Sosialinum 7. mai 2014). Móðurmálsstavraðið hevur eisini dygga fakliga undirtøku frá føroyskum málfrøðingum og -granskarum, umframt táverandi minnilutanum í Málráðnum.

Í spurninginum um móðurmálsstavraðið tók fráfarandi Málnevndin eisini einmælt undir við tilmælinum frá Løgtingsins Mentanarnevnd.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Í tí fyrsta Málráðnum frá januar 2013 valdi meirilutin at skerja móðurmálsstavraðið við stavunum C, W, Q, Z og X, og hetta skerda stavraðið við bara 29 stavum varð sett í gildi av einum meiriluta, ið ikki ynskti alment kjak um stavraðið. Minnilutin slapp ikki framat við sínum sjónarmiði, eins og avgerðin var beinleiðis í andsøgn við tilmælini frá Løgtingsins Mentanarnevnd um, at Málráðið skuldi vera so breitt samansett, at fleiri fatanir komu til orðanna í ráðnum.

Í veruleikanum hava vit tí nú tvey stavrøð: tað skerda stavraðið við 29 stavum, og eitt stavrað við 34 stavum (tað latínska stavraðið við 26 stavum umframt 8 serstavir). Hetta er eisini beinleiðis í andsøgn við tilmælið frá Løgtingsins Mentanarnevnd um, at Føroyar bara eiga at hava eitt stavrað.

Sambært løgtingslógini um Málráðið frá 2013 (§ 10, stk. 3) skuldi ein eftirmeting av Málráðnum leggjast fyri Løgtingið eftir trimum árum, fyri at kanna um lógin virkaði eftir ætlan. Hetta varð ikki gjørt.

Eftirmetingin av Málráðnum, sum Lóður gjørdi 18. november 2016, telur 16 A4 síður, og inniheldur álvarsamar atfinningar av arbeiðsgongdini í ráðnum, eins og hon vísir á samstarvstrupulleikar í ráðnum.

Ein stuttur samandráttur av eftirmetingini hjá Lóðri frá 2016:

1. Málráðið umboðar ikki málfatanina hjá Føroya fólki, og fólk kenna seg ikki heima í málinum.
2. Lurtað verður ikki eftir, hvat meirilutin av føroyingum heldur ella ynskir, t.d. viðvíkjandi stavraði, stavseting o.tíl.
3. Puristiski meirilutin í Málráðnum ynskir ikki alment kjak um stavraðið, og loyvir ikki minnilutanum framat við sínum sjónarmiðum.
4. Ráðið hevur ikki nóg stóra virðing fyri yrkislærdum fólki, hóast tað stendur í lógini fyri Málráðið, at ráðið skal samstarva við yrkisbólkar.
5. Puristiski meirilutin velur bert sínar egnu í starvsnevndina og ignorerar minnilutan, loyvir ikki kjaki og hevur eina atferð, sum førir til valdsmisnýtslu.
6. Formaðurin í ráðnum virðir ikki sáttmálan hjá UNGEGN (United Nations Group of Experts on Geographical Names) í Sameindu Tjóðum, hóast umboð fyri sama var partur av minnilutanum.

Hendan eftirmetingin varð ongantíð løgd fyri Løgtingið, hóast fleiri áminningar.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Hetta lógaruppskotið skal bøta um ta ósakligu og ódemokratisku viðgerðina, har føroyska stavraðið varð skert, hóast ein samd Mentanarnevnd í Løgtinginum mælti frá hesum, eins og viðgerðin manglaði breiða undirtøku og var í ósamsvari við mentanarlig, málfrøðilig og pedagogisk sjónarmið.

Sambært táverandi minnilutanum í Málráðnum og serfrøðingunum í føroyskum máli, er eitt stavrað ikki nøkur natúrlóg, men ein praktiskur listi við teimum bókstøvum, sum eru í brúki í einum máli. Hesi mæla til, at móðurmálsstavraðið verður viðurkent og løggilt. Eisini er hetta eitt stavrað, sum allir føroyingar kenna seg aftur í, og hetta hevur als ongar negativar fylgjur fyri føroyskt sum mál, tí tað er longu praktiserað í orðabókum, tekstum og málinum yvirhøvur (sí "Skjal C: viðmerkingar til uppskotið" í LM-075/2013).

Málið um stavraðið er ikki bara ein málfrøðiligur spurningur, men eisini ein mentanar-politiskur spurningur, sum Løgtingið sambært tilmælunum frá Mentanarnevndini í 2009 eigur at taka støðu til.

Endamálið við lógaruppskotinum er at seta í gildi aftur og formliga staðfesta móðurmálsstavraðið sum tað einasta almenna føroyska stavraðið.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Frá 1. januar 2026 verður føroyska stavraðið skipað í hesar bókstavir: A, Á, B, C, D, Ð, E, F, G, H, I, Í, J, K, L, M, N, O, Ó, P, Q, R, S, T, U, Ú, V, W, X, Y, Ý, Z, Æ, Ø.

Føroyska stavraðið verður bindandi fyri allar almennar myndugleikar, stovnar og skúlar, og skal nýtast sum stavrað í orðabókum og málsligari vegleiðing. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um, hvussu stavraðið verður brúkt í undirvísing og málsligari leiðbeining.

Endamálið er at fáa eitt sameint og løggilt stavrað, sum eisini inniheldur stavirnar C, W, Q, Z og X, eins og stavrøðini í flestu málum, ið føroyskt er skylt við. Hetta byggir eisini á tilmælini frá Løgtingsins Mentanarnevnd, sum í 2009 metti, at spurningurin um stavraðið ikki bara er málfrøðiligur, men eisini eitt mentanarpolitiskt mál, sum Løgtingið eigur at taka støðu til.

## Kapittul 2. Avleiðingar av uppskotinum

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur sum so. Tó skal viðmerkjast, at orðabøkur og onnur málslig amboð, sum Málráðið ritstjórnar, skulu gerast í samsvari við stavraðið í hesi lóg, umframt at stavraðið verður bindandi fyri almennar myndugleikar, skúlar og stovnar.

Uppskotið gevur landsstýrisfólkinum heimild at áseta nærri reglur fyri nýtslu av stavraðnum í skúlum og málsligari leiðbeining.

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### Til § 1

Við hesi áseting verður lógarfest, at føroyska stavraðið er skipað í hesar bókstavir: A, Á, B, C, D, Ð, E, F, G, H, I, Í, J, K, L, M, N, O, Ó, P, Q, R, S, T, U, Ú, V, W, X, Y, Ý, Z, Æ, Ø.

Talan er um tað vanliga latínska grundstavraðið (26 stavir) við teimum átta serstavunum, ið hava verið fastur partur av føroyska málinum í fleiri ættarlið. Við broytingini verða stavirnir C, W, Q, Z og X aftur tiknir inn sum lógarbundin partur av stavraðnum.

Hetta samsvarar við stavraðið í teimum málum, sum føroyskt er skylt við, t.d. enskt, danskt, norskt og svenskt, og ger tað lættari at handfara útlendsk nøvn, lániorð og fakorð. Ásetingin hevur eisini týdning fyri móðurmálsorðabøkur, tí stavraðið er beinleiðis grundarlagið fyri, hvussu orð verða skrivað og skipað.

Ásetingin tryggjar, at eingin ivi er um, hvørjir stavir hoyra til føroyska stavraðið.

### Til § 2

Greinin ásetir, at føroyska stavraðið, nevnt í § 1, er bindandi fyri allar almennar myndugleikar, skúlar og stovnar. Hetta ber við sær, at alt alment skrivligt tilfar, t.d. frágreiðingar, reglur, heimasíður, undirvísingartilfar o.s.fr., skal gerast í samsvari við hetta stavraðið.

Greinin tryggjar, at orðabøkur og aðrar álítandi málsligar keldur verða skipaðar eftir stavraðnum. Hetta forðar fyri, at óneyðugar tvístøður og málsligt ósamsvar stinga seg upp orsakað av, at almennir myndugleikar og stovnar nýta ymisk stavrøð.

Ásetingin tryggjar eisini, at føroyska skriftmálið verður samanhangandi og sameint, og hetta bæði lættir um undirvísing og styrkir málsliga samleikan.

**Til § 3**
Greinin gevur landsstýrisfólkinum heimild at áseta nærri reglur um, hvussu stavraðið skal nýtast í skúlum og í málsligari leiðbeining.

**Til § 4**
Áseting um gildiskomu.

**Á Løgtingi, 9. september 2025**

| | | |
|---|---|---|
| Bárður á Steig Nielsen | Helgi Abrahamsen | Magnus Rasmussen |
| Erhard Joensen | Johan Dahl | Eyðdis Hartmann Niclasen |
| | Jaspur Langgaard | |